KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 23.03.2017 kl. 17:30
Málnr.: 16/01208 Gerðabók

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Signhild Vilhelmsdóttir Johannesen, Gunvá við Keldu, Atli Steinbjørn Justinussen, Beinir Johannesen, Steinbjørn O. Jacobsen, Kristian Eli Zachariasen, Herfrí J. Sørensen, Óli M. Lassen, Tummas Jóhansson Lervig og Beinta Klakstein.

Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, stjórnarskrivari

Málsyvirlit		
27/17	17/00274-5	Broyting av 7. parti í Kommunustýrisskipanini - *fyrra viðgerð*
28/17	15/00451-3	Matrikulering av sethúsagrundøkjum Oman Valrætt
29/17	17/00152-1	Vantandi játtan 2016 – Dr. Margrethu Barnagarður – *eykajáttan, seinna viðgerð*
30/17	16/00789-4	Rakstrar-, íløgu-, og likviditetsætlan. Framflytingar v.m. 2017
30/17 (1)	16/00436-20	Bygging av nýggjum dagstovni, fyrireiking
30/17 (2)	17/00103-2	Skaði - gøtuljós og gomlu vatnbrunnarnir 2016-2017
30/17 (3)	17/00142-4	Nýtt kampingøki - Ferðavinnan í Norðoyggjum
30/17 (4)	17/00249-1	Broytingar av fíggjarætlanini 2017, §3 Børn og ung
30/17 (5)	17/00196-4	Ferðsluljós við Dr. Margrethu Barnagarð og Norðoya Sparikassa

27/17
17/00274 Broyting av 7. parti av Kommunustýrisskipanini - *fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	21.02.2017	27/17	
2 Fíggjarnevndin	21.03.2017	41/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	23.03.2017	27/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	04.05.2017		

Frágreiðing um málið:
Manntalslisti fyri árið 2016 varð sendur kommununi frá Landsfólkayvirlitinum / Umhvørvisstovuni 6. feb. 2017. Sambært hesum lista er íbúgvaratalið í Klaksvíkar og Húsa kommunum pr. 1. jan. 2016 samanlagt 5001 íbúgvar. (Hesar kommunur hava sum kunnugt lagt saman í eina kommunu ársskiftið 2016/2017.)

Lóggávan viðger ikki hesa aktuellu støðuna, sum er í hesum førinum, at tað eru tvær kommunur, Húsa- og Klaksvíkar kommunur, sum leggja saman í eina kommunu, samstundis sum samlaða fólkatalið fer upp um eitt í lógini ásett mark (4999), ið broytir samsýningarnar til býráðslimir v.m.

Tó er greitt út frá samanleggingarsáttmálanum og samskifti kommununnar við Kommunudeildina hjá landsstýrinum, at tá ið tvær kommunur leggja saman í eina samanlagda kommunu, er ikki talan um, at onnur verður limað inn í hina, sum síðan heldur fram, men talan um ein nýggja kommunu, eina nýggja løgfrøðiliga eind, sum byrjar við samanleggingini, samstundis sum tær frammanundan sjálvstøðugu kommunurnar, sum leggja saman, halda uppat at vera til.

Hetta kemur eitt nú fram í løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur, har § 4 ásetur, at "áðrenn avtalur um kommunusamanleggingar verða góðkendar av landsstýrismanninum sambært § 5, skal semja í minsta lagi vera um: 1) kommununavnið, har heitið "kommuna" skal vera ein partur av navninum."

Tann samanlagda, núverandi Klaksvíkar kommuna er sostatt ikki tað sama sum fyrrverandi Klaksvíkar kommuna, hóast tær eita líka. Tann nýggja, samanlagda Klaksvíkar kommuna kundi tað sama havt eitt heilt annað navn, t.d. Húsa kommuna.

Sama framgongur av sáttmálunum um tær higartil gjørdu samanleggingarnar, har Klaksvíkar kommuna hevur verið annar parturin, har tað eitt nú er ásett í § 2 "Sjálvboðin samanlegging", at "Húsa Kommuna og Klaksvíkar Kommuna verða lagdar saman til eina kommunu frá 1. januar 2017 at rokna", og har § 3 "Navn og leiðsla", ásetur, at "samanlagda kommunan fær navnið "Klaksvíkar kommuna"", og at "samanlagda kommunan verður stýrd av einum býráði, sum <u>fyrstu ferð</u> verður valt á kommunuvalinum í november 2016."

Tí er tað í hesum føri rætt at brúka íbúgvaratalið pr. 1. januar í valárinum (2016) í <u>báðum</u> hesum samanløgdu kommununum, hvørs borgarar á kommunuvalinum 8. november 2016 valdu núsitandi býráð fyri samanløgdu kommununa.

Einfalda orsøkin til hesa logisku niðurstøðu er, at tað gevur ikki meining bara at brúka íbúgvaratalið hjá aðrari av hesum kommununum pr. 1. januar 2016, hóast tær tá vóru tvær sjálvstøðugar kommunur, tí harvið verður neyðugt at velja aðra og vraka hina fyrrverandi kommununa, sum nú eru samanlagdar í eina og somu kommunu.

Hesi somu viðurskifti gjørdu seg eitt nú eisini galdandi, tá ið fyrrverandi Leirvíkar kommuna og Gøtu kommuna løgdu saman í eina samanlagda kommunu, sum í tí førinum fekk navnið "Eysturkommuna".

At íbúgvaratalið í kommununi er farið upp um 4999 viðførir, at neyðugt er at broyta 7. part í Kommunustýrisskipanini um samsýningar o.a., vísandi til kunngerð nr. 93 frá 9. september 2014 um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini.

Sostatt hevur eitt íbúgvaratal hægri enn 4999 við sær, at talið av kommununnar umboðum í stýrinum fyri NBH fer upp (aftur) á 7 limir, borgarstjórin íroknaður.

Lógargrundarlag:

- Kunngerð nr. 93 frá 9. september 2014 um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini
- § 7, stk. 3 í løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Fíggjarligar avleiðingar:
Viðførir eina økta samsýning til borgarstjóra og býráðslimir.
Víst verður annars til útgreining av fíggjarligu avleiðingunum á viðfestu undirskjølum.

Tilmæli:
Mælt verður til at broyta kommunustýrisskipanina samsvarandi broytta íbúgvaratalinum og í tráð við kunngerðina. Broyting av kommunustýrisskipan skal hava tvær viðgerðir í býráðnum.
Harumframt verður mælt til at velja tvey umboð aftrat í stýrið fyri NBH.

FíN 21-02-2017
Málið tikið av skrá.

FíN 21-03-2017
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 15-02-2017.

Býráðsins samtykt 23-03-2017
Einmælt samtykt, at broyta 7. part í Kommunustýrisskipanini við fyrru viðgerð.

Einmælt samtykt, at verandi limir í stýrinum fyri NBH - Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen - halda fram, og at Tummas J. Lervig og Steinbjørn O. Jacobsen eru valdir aftrat í stýrið.

Harumframt staðfest, at 1. tiltakslimur er Óli M. Lassen, og 2. tiltakslimur er Gunvá við Keldu.

28/17
15/00451 Matrikulering av sethúsagrundøkjum Oman Valrætt

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.03.2017	22/17	
2 Fíggjarnevndin	21.03.2017	31/17	
3 Klaksvíkar Býráð	23.03.2017	28/17	

Frágreiðing um málið:
Víst verður til UBN-nevndarsamtykt frá 29.06.2015 í máli nr. 15/00449 og 15/00451.

Niðanfyri er víst uppskot til útstykking av matr.nr. 1005a í 4 grundøkir á uml. 500 m^2, sum sambært omanfyrinevndu samtyktum verða at bjóða 4 traðaeigarum á Helnabrekku. Samstundis verður lagt upp til, at matr.nr. 1005i verður tøkt til íbúðarbygging og matr.nr. 1035a+d til alternativa bygging (raðhús, ketuhús ella líknandi)

Traðaeigarar, sum eiga stykkir til góðar í Helnabrekku-økinum eru:

Matr.nr. 971, Matras-systkini, (Bjarni og Anna):	2 grundøkir
Matr.nr. 972: Dánjal Joensen´s arv.:	1 grundøki
Matr.nr. 973: Fríðborg Jacobsen	2 grundøkir
Matr.nr. 1036: Kristmund Hansen	3 grundøkir
Tilsamans	8 grundøkir



Lógargrundarlag:
-

Fíggjarligar avleiðingar:
Útreiðslur fyri matrikulering: uml. kr. 28.000,- (fíggjast av Byggibúning Bústaðir)
Møguliga upp til kr. 400.000,- sum útgjald í staðin fyri grundøkir. Verður hetta aktuelt, selur kommunan sjálv stykkini og fær inntøkur av søluni. Í hesum føri verður málið tikið upp serskilt til ásetan av søluprísi.

Tilmæli:
Mælt verður til at
- frámatrikulera til grundøkir, sum víst á viðhefta plani
- at eitt stykkið verður boðið til hvønn traðaeigara við somu treytum, sum tey higartil latnu, m.a.
  Byggifreist uppá eitt ár
  Víðarisøla góðkennast av býráðnum

- Um traðaeigarin ikki tekur av møguleikanum av stykki Oman Valrætt, verður honum boðið kr. 100.000,- sum avrokning av tí eina stykkinum (sí býráðssamtykt frá 12.11.2015), samstundis sum aktuella stykkið verður boðið umsøkjarum á grundstykkjalistanum ella – í øðrum lagi – selt á almennum útboði.

Verður tikið undir við omanfyrinevnda leisti minkar talið av grundøkjum, sum kommunan "skyldar" eigarum á Helnabrekku úr 8 niður í 4, og verður - í tí føri – miðað eftir at taka spurningin um avgreiðslu av teimum eftirverandi 4 grundøkjunum upp seinni í ár ella í 2018.

UBN 13-03-2017
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagfest tann 06-03-2017

FíN 21-03-2017
Nevndin tekur undir við UBN 13-03-2017.

Býráðsins samtykt 23-03-2017
Tilmælið frá FíN 21-03-2017 einmælt samtykt.

29/17
17/00152 Vantandi játtan 2016 – Dr. Margrethu Barnagarður – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	14.02.2017	12/17	
2 Fíggjarnevndin	21.02.2017	19/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	23.02.2017	16/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	23.03.2017	29/17	

Frágreiðing um málið
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 23. februar 2017.

14.02.17 TRN B&U:
Nevndin samtykti, at taka undir við tilmælinum dagfest 07.02.17.

FíN 21-02-2017
Nevndin tekur undir við B&U 14-02-2017.

Býráðsins samtykt 23-02-2017
Tilmælið frá FíN 21-02-2017 einmælt samtykt.

Býráðsins samtykt 23-03-2017
Óli M. Lassen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

MÁLINI 30/17 (1-5) VERÐA VIÐGJØRD SUM UNDIRMÁL TIL MÁL NR. 30/17

30/17
16/00789 Rakstrar-, íløgu-, og likviditetsætlan. Framflytingar v.m. 2017

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	21.03.2017	40/17	
2 Klaksvíkar Býráð	23.03.2017	30/17	

Frágreiðing um málið:

Framflytingar/eykajáttanir

Inntøkur og útreiðslur í samtyktu fíggjarætlanin fyri 2017 javnviga við einum íløgukarmi á 53 mió.kr. og avdráttir á 8 mió. kr. Tí føra framflytingar við sær eitt rokskaparligt hall, ið skal fíggjast antin við íløguinntøkum, tøkum peningi ella við lánifígging.

	Uppruna ætlan 2017	Tillagingar 2017	Framflytingar	Ætlan eftir broyting
Inntøkur	**247.000**			**247.000**
Rakstur	**186.000**	**500**		**186.500**
Rakstraravlop	**61.000**			**60.500**
Íløgur	**53.000**	**13.000**	**22.500**	**88.500**
Avdráttir lán	**8.000**	**-2.000**		**6.000**
Úrslit eftir avdráttir	**0**			**-34.000**

Ætlaðu framflytingarnar eru tilsamans knapt 22,5 mió. kr. og eru útgreinaðar á niðanfyri standandi talvu.

Útgreining av framflytingum/eykajáttanum.

	Framflytingar frá 2016	Fíggjarætlan 2017	Tillagingar 2017	Íløgur og raðfestingar í alt 2017
Barnaansing felags (nýggjur dagstovnaskáli)	**3.150**			**3.1l50**
Nýggjur skúli (Á Skúlatrød)	**800**	**23.000**		**23.800**
Ymisk tilboð/tiltøk mentan frítíð (mentanarpallur)	**2.150**	**4.600**		**6.750**
Ítróttarøkið	**7.950**			**7.950**
Sparkivallir	**300**		**500**	**800**
Fastognir	**1.150**	**4.000**		**5.150**
Byggibúning bústaðir	**2.000**			**2.000**
Byggibúning miðbýur	**1.000**	**4.700**		**5.700**
Havnir og lendingar (Havnaøkið)	**4.000**	**3.500**		**7.500**
Vegir íløga		**3.500**	**500**	**4.000**
Spillivatn/hitaskipan		**6.000**		**6.000**

Hallirnar		**500**		**500**
Bilar til eldraøkið		**700**		**700**
Vøllur í Árnafirði		**1.500**		**1.500**
Spinnaríið (íløgustuðul)			**3.000**	**3.000**
Útstykking á Fossum			**2.800**	**2.800**
Rennibreyt (avgrestur og annað)		**1.000**	**2.000**	**3.000**
Nýggjur Barnagarður			**200**	**200**
Spæliland (rakstrarkostnaður)			**500**	**500**
Svimjihøllin (Vælverudepil og kampingpláss)			**3.500**	**3.500**
Í alt	**22.500**	**53.000**	**13.000**	**87.400**

Tøkur peningur hjá kommununi við ársbyrjan 2017 var 60 mió. kr. Trekkja vit hækkingina av íløgunum (22,5 mió. kr.) frá, verður likviditeturin 37,5 mió. kr.

Av hesum skulu 23,5 mió. kr. bindast til skúlabyggingina. Har eru longu 5 mió. kr. bundnar frá 2014 og saman við 18,5 mió. kr. frá 2015, verða 23,5 mió. kr. av innistandandi bundnar til skúlabyggingina.

Leggjast skal afturat at í inniverandi fíggjarætlan eru 23 mió. kr. settar av til skúlabygging og verða 0,8 mió. framfluttar afturat. Samanlagt hevur kommunan 47.3 mió. kr. til nevndu verkætlan.

Tá lagt er upp fyri hesum, er likviditeturin 14 mió. kr. eftir framflytingar og gjaldføri, ið sett er til síðis til skúlabygging.

Tøkur peningur primo 2017		60.000.000
Avdráttir reguleraðir frá 8 til 6 mió.		2.000.000
Tøkur peningur eftir regulering		**62.000.000**
Framflytingar íløgur (sí uppgerð)		-22.500.000
Tøkur peningur áðrenn skúlabygging		**39.500.000**
Bundið til skúlabyggingina		-23.500.000
Tøkur peningur eftir framflytingar og pengabindingar		**16.000.000**

Býráðið hevur samtykt ymiskar verkætlanir, ið peningur enn ikki er avsettur til. Farna árið var sera gott, og tískil hava formennirir í felag mælt til, at raðfesta hesar verkætlaninar innan verandi gjaldføri:

Sparkivallir (Jørundsgøta)	500.000
Svimjihøllin (Vælverudepil og kampingpláss)	3.500.000
Vegir íløga	500.000
Spinnaríið	3.000.000

Útstykking á Fossum	2.800.000
Rennibreyt (avgrestur og annað)	2.000.000
Nýggjur Barnagarður	200.000
Spæliland (rakstrarkostnaður)	500.000
Í alt	13.000.000

Tá seinastu framflytingarnar vórðu gjørdar í 2016, var endaliga gjaldførið – eftir at hædd varð tikið fyri verkætlanina við Bláa Skýlinum – 2.270.020 kr.

Við omanfyri nevndur framflytingum og raðfestingum verður endaliga gjaldførið eftir allar avsetingar uml. 3 mió. sambanborðið við 2,3 mió. undanfarna ár.

Í omanfyristandandi uppgerð, er innistandandi peningurin hjá Húsa kommunu ikki innroknaður. Húsa kommuna hevði gott gjaldføri, og samtyktu tey fíggjarætlan við íløgum, í skuldi brúka innistandandi peningin. Hetta var partur av samskiftinum í samband við yvirtøkuna.

Innistandandi peningur hjá fyrrverandi Húsa kommunu verður býttur soleiðis:

Vegir íløga	1.000
Vatnverk íløga	1.000
Í alt	2.000

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin § 41, stk. 2: «Kommunustýrið kann tó um neyðugt veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað.

Fíggjarligar avleiðingar:
Framflytingar og tillagingar á 34 mió. kr. eru at meta sum eykajáttanir, og hetta merkir, at verandi fíggjarætlan, sum javnvigar við kr. 0, fer at vísa 34 mió. kr. í halli.

Tilmæli:
Hervið verður málið um eykajáttanirnar ísbv. Framflytingar og tillagingar lagdar fyri nevnd og býráð til støðutakan/góðkenningar.

FíN 21-03-2017
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 17-03-2017. Gunvá við Keldu tekur støðu í býráðnum.
(Øll málini verða løgd fyri býráðið hvør sær.)

Býráðsins samtykt 23-03-2017
Fyrst varð atkvøtt um niðanfyri standandi mál nr. 30/17 (1-5) – sí samtyktirnar niðanfyri.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá FíN 21-03-2017 við teimum undir mál nr. 30/17 (1-5) samtyktu broytingum.

Hetta varð einmælt samtykt.

30/17 (1)
16/00436 Bygging av nýggjum dagstovni - fyrireiking

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	14.02.2017	13/17	
2 Fíggjarnevndin	21.02.2017	18/17	
3 Klaksvíkar Býráð	23.03.2017	30/17 (1)	

Frágreiðing um málið:
Eftir at serfrøðingabólkur hevur mælt kommununi til at gera tveir nýggjar dagstovnar fyri at nútímansgera og langtíðartryggja dagstovnaøkið, varð málið lagt fyri Trivnaðarnevnd Børn & Ung í desember 2016, har samtykt varð at fara undir at fyrreika bygging av tí fyrra dagstovninum, sum skal byggjast á eystara armi í býlinginum undir Grashjalla.

Fyrsta stigið er at gera eina byggiskrá fyri nýggja dagstovnin, og umráðandi er, at hann verður mannaður av fólki við fakligum førleikum innan námsfrøði, leiðslu, umsiting og teknikk.

Mælt verður til, at byggiskrásbólkurin verður mannaður soleiðis:

- ein arkitektur,
- ein verkfrøðingur umboðandi kommununa,
- trivnaðarstjórin,
- barnaansingarsamskiparin,
- dagstovnaleiðari, valdur av dagstovnaleiðarunum í felag, og
- tveir námsfrøðingar, sum eru í starvi innan dagstovnaøkið hjá Klaksvíkar kommunu.

Mett verður, at byggiskrá fyri nýggjan dagstovn í Klaksvíkar kommunu fer at kosta 60.000,- – 75.000,- kr. og umsitingin vil tryggja sær, at upphæddin hevur fingið politiska viðtøku, áðrenn manning av byggiskrás-bólkinum verður funnin. Tí verður málið við hesum lagt fyri til politiska umrøðu og støðutakan.

Tilmæli frá serfrøðingabólki:
Sambært *Barna- og ungdómsvirðunum hjá Klaksvíkar kommunu* eiga børnini at hava allarbestu karmar og kor. Viðlíkahald av bygningum og uttanumøki, har børn eru stóran part av degnum, eigur at vera ein náttúrligur partur. Brot úr Barna- og ungdómsvirðunum:

Øll hava rætt til eitt gott lív, og Klaksvíkar kommuna strembar við virðunum miðvíst ímóti at skapa karmar fyri góðum uppvakstrarkorum hjá øllum børnum og ungum í kommununi. Virðini verða framd av umsitingini og viðkomandi stovnum í kommununi samav við teimum sum vara av barninum og unglinganum. Foreldrini hava evstu ábyrgd av barninum og tess trivnaði, menning og læring, og kommunan skapar karmar fyri hesum.

Arbeiðsbólkurin er komin til ta niðurstøðu, at farast skal undir at byggja 2 nýggjar dagstovnar.Tekniska umsiting hevur víst á tvey hóskandi økir í kommununi til hetta endamál.

Farast skal undir tann fyrsta stovnin beinanvegin, og tí mugu pengar setast av til arbeiðið. Miðast skal ímóti, at stovnurin stendur klárur á sumri 2018. Hesin skal verða staðsettur undir Valrætt – norðan fyri Domus. Talan er um C12 økið, ið Klaksvíkar kommuna eigur og sum uppfyllir treytirnar í byggisamtykt

fyri m.a. dagstovn. Í hesum føri verður mælt til stovn við 5 eindum. Tvær vøggustovur og tvær barnagarðsstovur, og tann 5. eindin skal fylgja tørvinum fyri ávíkavist vøggustovu ella barnagarðsstovu. Sveiggini í barnatalinum frá ári til ár eru lutfalsliga stórt, og tí er neyðugt at hava eina stovu, sum er smidlig.. Sambært TU er alt tað, sum liggur norður til húsini hjá Archie Black, avsett til bústaðabygging.

Næsta dagstovnin mælir arbeiðsbólkurin til at byggja á C1 økið, sum er Niðan Horn. Økið er avsett til endamálið, men Klaksvíkar kommuna eigur tað ikki. Neyðugt verður tí, at kommunan fær tey formligu viðurskiftini í rættlag. Arbeiðsbólkurin metir hesa staðseting vera góða í mun til framtíðar búseting, fjarstøða millum stovnar og tættleikan við náttúruna.

Lógargrundarlag:
Dagstovnalógin ásetur, at tað er ábyrgd kommununnar at útvega tilboð um barnaansing í nøktandi karmum.

Fíggjarligar avleiðingar:
Mett verður, at byggiskrá fyri nýggjan dagstovn í økinum undir Grashjalla í Klaksvíkar kommunu fer at kosta 60.000 – 75.000 kr., sum verður at fíggja av «íløgujáttanini «nýggjur dagstovnur»

Tilmæli:
Mælt verður til, at TrN B&U tekur undir við at gera byggiskrá fyri nýggjan dagstovn við býlingin undir Grashjalla, og at metti kostnaðurin á 60.000 – 75.000 kr. verður fíggjaður av íløgujáttanini «nýggjur dagstovnur».

TrN B&U 14-02-2017
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum dagfest 07.02.17.

FíN 21-02-2017
Málið útsett til komandi nevndarumfar.

Býráðsins samtykt 23-03-2017
Atkvøtt varð um soljóðandi uppskot frá borgarstjóranum: *"Mælt verður býráðnum til at taka undir við TrN B&U 14-02-2017 vísandi til mál 30/17 (j.nr.: 16/00789) um framflytingar og umraðfestingar."*

Uppskotið einmælt samtykt.

30/17 (2)
17/00103 Skaði - gøtuljós og gomlu vatnbrunnarnir 2016-2017

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Tekniska Nevnd	15.02.2017	8/17	
2 Fíggjarnevndin	21.02.2017	16/17	
3 Klaksvíkar Býráð	23.03.2017	30/17 (2)	

Frágreiðing um málið:
Ársskifti 2016/2017 vóru fleiri ódnir, sum gjørdu skaða á ognir kommununnar í Svínoy og í Klaksvík.

Viðv. gøtuljósunum:
Í Klaksvík fingu fleiri gøtuljós skaða runt um í býnum. Talan er um eini 20 ljós, sum hava fingið skaða, og eru fleiri, sum ikki kunnu umvælast.

Í Svínoy er støðan verri, tí talan er um gomul gøtuljós (neonljós). Eini 45 gøtulyktir gjørdust myrkar av ódnunum, og einar 13 lyktir hava fingið so stóran skaða, at tær kunnu ikki umvælast.
Upplýst verður, at gøtuljósini í Svínoy, sum vóru skift út til LED-ljós eftir seinasta ódnina, fyri nøkrum árum síðani, hava ikki fingið skaða. Sí annars viðfestu frágreiðing.

Mett verður, at skaðin á gøtuljósini kostar einar 300 tkr. at umvæla.

Viðv. gomlum vatnbrunnum: (brunnar sum kommunan hevur yvirtikið frá privatum vatnfeløgum)
Yvirtromin av vatnbrunninum við Ravnagil, sum fór í ódnarveðrinum, lá heilt uppi á Grashjalla, og ymist annað tilfar frá brunninum lá runt um ymsastaðni har á leiðini.
Talan er eisini um aðrar vatnbrunnar, har stórur vandi er fyri, at skaði hendur, og tí er neyðugt, at kommunan fremur umvælingararbeiði, og niðurtøku av brunnum. Sí annars við festu frágreiðing.

Mett verður, at upprudding og niðurtøka av gomlum *(fúnaðum)* tekjum á vatnbrunnum fer at kosta einar 300 tkr. *(Ravnagil, omanfyri Kjalarskákið, oman fyri Gerðar, undir Hálsi o.a.)*

Um allir óvirknir vatnbrunnar í Klaksvíkarøkinum skulu takast heilt niður, so verður talan um munandi hægri kostnað.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking.

Fíggjarligar avleiðingar:
Staðfest er, at talan er um kostnaðarmikið arbeiðið, tilsamans einar 600 tkr., sum ikki kann fíggjast innan verandi rakstrarjáttan til Gøtuljósini og Vatnveitingina. Tí verður lagt upp til, at Klaksvíkar Býráð samtykkir eykajáttan bæði til Gøtuljósini, uppá 300 tkr., og til Vatnveitingina 300 tkr.

Tilmæli:
Við hesum verður mælt nevndum og býráði til at taka undir við málinum, og at fíggja nevndu eykajáttanir av tøkum peningi hjá kommununi í 2017.

TN 15-02-2017:
Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU 01-02-2017.

FíN 21-02-2017
Málið útsett til komandi nevndarumfar.

Býráðsins samtykt 23-03-2017
Atkvøtt varð um soljóðandi uppskot frá borgarstjóranum: *"Mælt verður býráðnum til at taka undir við TN 15-02-2017 og fremja arbeiðið, men at beina sjálva avsetingina aftur til Teknisku Nevnd at útgreiðna, vísandi til mál 30/17 (j.nr.: 16/00789) um framflytingar og umraðfestingar."*

Uppskotið einmælt samtykt.

30/17 (3)
17/00142 Nýtt kampingøki - Ferðavinnan í Norðoyggjum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.02.2017	12/17	
2 Mentanarnevndin	14.02.2017	10/17	
3 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	14.02.2017	10/17	
4 Fíggjarnevndin	21.02.2017	14/17	
5 Klaksvíkar Býráð	23.03.2017	30/17 (3)	

Frágreiðing um málið:
Í 2016 samtykti býráðið at fremja verkætlan við nýggjari dagstovnaeind úti í Grøv, sum er ein víðkan av Fjallafípuni.

Ein avleiðing av hesum er, at økið, sum hevur verið nýtt til kamping, bleiv tikið til verkætlanina, og tí er onki øki at vísa til, tá ferðafólk vilja vitja við kamping í Klaksvík.

Kunningarstovan hevur gjørt vart við hetta og ynskir at vita, hvar slíkar vitjanir framyvir kunnu halda til.

Tekniska Umsiting hevur í hesum sambandi kannað, hvørji øki møguliga kunnu koma upp á tal, og er komin til, at besta boð er økið sunnan fyri Svimjihøllina. Sí viðlagda notat, dagfest 3. februar 2017, har niðurstøðan er henda:

6. Við Mýriveg - sunnanfyri svimjihøllina – uml. 640 m² + møguleika fyri víðkan til uml. 1.400 m² um Fifa-vøllurin verður fluttur

+ Kommunal ogn
+ Central staðseting
+ Alment wc nærhendis
+ Svimjihøll nærmasti granni
+ Fríðarligt øki
+ Gongur ikki útyvir nakað parkeringspláss
+ Nær við tunnilin
+ Ongin ferðlsa gjøgnum býin
÷ Ikki klárt at taka í nýtslu – krevur planering o.a.
÷ Kostnaður fyri klárgering uml. 500.000,-

Útfrá umrøðu av omanfyri nevndu uppskotum mælir Tekniska Umsiting til, at málið verður sent avvarðandi nevndum: UBN, MeN og Børn og Ung við

- tilmæli um at vísa á øki 6 (við Mýriveg)
- støðutakan til fígging
- o.a.

Til tess at fremja hesa ætlan verður neyðugt at planera, leggja asfalt og møguligar aðrar innstallatiónir.

Tekniska Umsiting metir, at hetta kostar umleið kr. 500.000,- Ongin tíðarætlan fyriliggur um, nær økið kann verða klárt at takað í nýtslu, men umráðandi er, at hetta verður skjótast gjørligt, tí eftirspurningurin eftir øki til vognar byrjar longu í apríl ! Herumframt verður neyðugt at gera atkomuvegin til Svimjihøllina í stand og væntast hetta at kosta uml kr.100.000,-

Ongin peningur er avsettur til hesa flyting av kampingøkinum og tí er neyðugt við eykajáttan, um so er, at ætlanin skal fremjast.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking

Fíggjarligar avleiðingar:
Fíggjarætlanin hækkar við kr. 600.000,-

Tilmæli:
Verður lagt fyri avvarandi nevndir til støðutakan

UBN 13-02-2017
Ein meirluti Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen og Signhild Vilhelmsdóttir Johannesen taka undir við tilmælinum dagfest 07-02-2017.
Ein minniluti Gunvá við Keldu og Beinir Johannesen mæla til at finna pening innan barnaansing felags, í samband við avsetingina barnagarðsskálar.

MeN 14-02-2017:
Ein meiriluti Signhild V. Johannesen, Óli M. Lassen og Beinta Klakstein tekur undir við meirilutanum í UBN 13-02-2017.
Ein minniluti Gunvá við Keldu tekur undir við minnilutanum í UBN 13-02-2017.
Ein annar minniluti Atli S. Justinussen mælir til at kommunan finnur eina varandi loysn til kampingpláss til umleið 100-200 kampingvognar.

TrN B&U 14-02-2017
Ein meirluti Beinta Klakstein, Signhild Vilhelmsdóttir Johannesen og Tummas Lervig taka undir við tilmælinum dagfest 07-02-2017.
Ein minniluti Beinir Johannesen mælir til at finna pening innan barnaansing felags, í samband við avsetingina barnagarðsskálar.
Ein minniluti Herfrí Sørensen tekur støðu í býráðnum.

FíN 21-02-2017
Málið útsett til komandi nevndarumfar.

Býráðsins samtykt 23-03-2017
Atkvøtt varð um soljóðandi minnilutauppskot í MeN 14-02-2017: *"Atli S. Justinussen mælir til, at kommunan finnur eina varandi loysn til kampingpláss til umleið 100-200 kampingvognar."*

Uppskotið fall við 5 atkv. fyri – GvK, ASJ, BJ, HJS og SOJ - og 6 atkv. ímóti – JS, SVJ, TJL, KEZ, ÓML og BK.

Síðani varð atkvøtt um minnilutatilmælið í UBN (GvK og BJ), MeN (GvK) og TrN B&U (BJ) (*"mæla til at finna pening innan barnaansing, felags í samband við avsetingina barnagarðsskálar"*).

Uppskotið fall við 5 atkv. fyri – GvK, ASJ, BJ, HJS og SOJ - og 6 atkv. ímóti – JS, SVJ, TJL, KEZ, ÓML og BK .

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælini í UBN, MeN og TrN B&U (*"tikið verður undir við tilmælinum, dagf. 07-02-2017"*), tó við tí ískoytinum at víst verður til mál 30/17 (j.nr.: 16/00789) um framflytingar og umraðfestingar.

Uppskotið einmælt samtykt.

30/17 (4)
17/00249 Broytingar av fíggjarætlanini 2017, §3 Børn og ung

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	14.02.2017	14/17	
2 Fíggjarnevndin	21.02.2017	26/17	
3 Klaksvíkar Býráð	23.03.2017	30/17 (4)	

Frágreiðing um málið:
Í sambandi við arbeiðið við fíggjarætlanini fyri 2017 høvdu vit á Trivnaðardeildini fundir við allar deildir og stovnar okkara, har vit lýsa tørv og ynskir, og har vit út frá samskiftinum seta upp fíggjarætlanartølini fyri komandi árið.

Eftirfylgjandi er hent tað mistak, at játtanirnar til *Dagrøktina* og *Mylnuhúsið*, sum er skrásettar í samtyktu fíggjarætlanini, ikki samsvara við okkara tøl. Til tess at rætta hesar skeivleikar og gera aðrar neyðugar útgreiningar hava vit gjøgnumgingið allan høvuðskontubólk 3, "*Børn & ung*", av nýggjum, samstundis sum vit hava roynt at funnið útvegir fyri, at ein neyðug eykajáttan verður so lítil sum tilber.

Neyðugt er at gera niðanfyri standandi flytingar millum kontur og broytingar í høvuðskontubólki 3:

Rakstrarstaður	*Upprunaliga samtykt fíggjarætlan 2017*	*Higartil samtyktar broytingar (jan-feb)*	*Fyriliggjandi fíggjarætlan 2017*	*Neyðugar broytingar at samtykkja afturat*	*Broytt fíggjarætlan 2017 at samtykkja*	*Notur*
Tilboð og tiltøk til børn og ung:						
Virkishúsið fyri ung	1.789.000 kr	0 kr	1.789.000 kr	0 kr	1.789.000 kr	
Ung í arbeiði	610.000 kr	0 kr	610.000 kr	0 kr	610.000 kr	
Tilboð og tiltøk til børn og ung – íalt	**2.399.000 kr**	**0 kr**	**2.399.000 kr**	**0 kr**	**2.399.000 kr**	
Dagstovnarnir:						
Dagrøktin	3.455.000 kr	0 kr	3.455.000 kr	804.500 kr	4.259.500 kr	Nota 1
Fjallafípan	2.371.000 kr	0 kr	2.371.000 kr	0 kr	2.371.000 kr	Nota 2
Blákollan	3.415.000 kr	0 kr	3.415.000 kr	0 kr	3.415.000 kr	Nota 3
Barnahúsið Margit	5.465.000 kr	0 kr	5.465.000 kr	0 kr	5.465.000 kr	Nota 4
Dr. Margrethu Barnagarður	8.453.000 kr	0 kr	8.453.000 kr	0 kr	8.453.000 kr	Nota 5
Mylnuhúsið	4.390.000 kr	0 kr	4.390.000 kr	465.500 kr	4.855.500 kr	Nota 6
Frítíðarskúlin Snjallabjalla	3.026.000 kr	0 kr	3.026.000 kr	0 kr	3.026.000 kr	Nota 7
Dagstovnarnir – íalt	**30.575.000 kr**	**0 kr**	**30.575.000 kr**	**1.270.000 kr**	**31.845.000 kr**	
Barnaansing felags:						

Keyp av vørum og tænastum	2.490.000 kr	0 kr	2.490.000 kr	-2.490.000 kr	0 kr	
Nýggj eind - víðkan av Fjallafípuni (skálar)	0 kr	0 kr	0 kr	1.900.000 kr	1.900.000 kr	Nota 9
Avseting at flyta til Skúlatannlæknan (§ 2)	500.000 kr	-500.000 kr	0 kr	0 kr	0 kr	
Avseting at flyta til Gigni á Skúlatrød (§ 2)	347.000 kr	-347.000 kr	0 kr	0 kr	0 kr	
Samanteljing	*3.337.000 kr*	*-847.000 kr*	*2.490.000 kr*	*-590.000 kr*	*1.900.000 kr*	
Avseting til aðrar útreiðslur	0 kr	0 kr	0 kr	90.000 kr	90.000 kr	
Avseting til tilfar ísv. viðlíkahald bygningar	500.000 kr	0 kr	500.000 kr	-500.000 kr	0 kr	
Tilskot einstakl. (systkinaavsl. foreldragj.)	430.000 kr	0 kr	430.000 kr	0 kr	430.000 kr	
Innanhýsis flyting í komm. (langtíðarsjúka)	0 kr	0 kr	0 kr	0 kr	0 kr	
Flyting til landið (gj.fyri vantandi barnaans.)	80.000 kr	0 kr	80.000 kr	0 kr	80.000 kr	
Inntøkur aðrar kom. (innanh.fl.m.alm.stvn.)	-600.000 kr	0 kr	-600.000 kr	-150.000 kr	-750.000 kr	
Samanteljing	*410.000 kr*	*0 kr*	*410.000 kr*	*-560.000 kr*	*-150.000 kr*	
Barnaansing felags – ialt	**3.747.000 kr**	**-847.000 kr**	**2.900.000 kr**	**-1.150.000 kr**	**1.750.000 kr**	Nota 8
§ 3 Børn og ung - samanlagt	**36.721.000 kr**	**-847.000 kr**	**35.874.000 kr**	**120.000 kr**	**35.994.000 kr**	

Viðmerkingar:

Notur:
Notur standa viðmerktar í teiginum uttast til høgru. Hesar vísa til viðfesta pdf-skjal, har avsetingarnar eru útgreinaðar á standardkontur v.m. – sí viðfest skjal.

Dagrøktin:
Dagrøktin hevði, sum nevnt, í samtyktu fíggjarætlanini fingið ov lítla játtan, og upphæddin á kr. 804.500 verður við hesum játta afturat, soleiðis at samlaða játtanin til Dagrøktina nú verður kr. 4.259.500.

Mylnuhúsið:
Mylnuhúsið hevði, sum nevnt, í samtyktu fíggjarætlanini fingið ov lítla játtan, og upphæddin á kr. 465.500 verður við hesum játta afturat, soleiðis at samlaða játtanin til Mylnuhúsið nú verður kr. 4.855.500.

Nýggj eind - víðkan av Fjallafípuni (skálar):
Býráðið hevur, sum kunnugt, samtykt hesa víðkan av dagstovnaøkinum, og játtanin til hesa nýggju eindina í Fjallafípuni, sum er útgreinað í notu 9 í viðfesta pdf-skjali, er samanlagt kr. 1.900.000 í inniverandi ári.

Avsetingar fluttar til Skúlatannlæknan og Gigni á Skúlatrød:
Í málum nr. 12/00492-74 og 17/00088-4, sum vórðu løgd fyri í januar (og seinna viðgerð nú í februar) verða kr. 500.000 + kr. 347.000 = kr. 847.000 fluttar millum kontur frá hesum rakstrarstaði (Barnaansing felags) og til Skúlatannlækna og Gigni á Skúlatrød, sum bæði hoyra til trivnaðarøkið, men eru partur av høvuðskontubólki 2.

Avseting til aðrar útreiðslur:
Henda játtan á kr. 90.000 undir barnaansing felags, sum verður brúkt til felags tiltøk, so sum árliga barnafagnaðin, ið barnaansingarsamkiparin skipar fyri.

Avseting til tilfar ísv. viðlíkahald bygningar:

Henda avseting á kr. 500.000 varð neyðug at strika fyri at kunna flyta manglandi játtanirnar til Dagrøktina og Mylnuhúsið og samstundis umgangast ov stóra eykajáttan. Henda broyting ger tað samstundis neyðugt, at ein tilsvarandi upphædd innan játtanina *Fastognir* verður tøk til tilfar ísv. viðlíkahald av dagstovnunum.

Tilskot til einstaklingar (systkinaavsláttur ísv. foreldragjøld):
Henda játtan er óbroytt, kr. 430.000.

Innanhýsis flyting í kommununi (langtíðarsjúka):
Undanfarin ár hava vit roynt at havt eina játtan tøka á hesum rakstrarstaði, sum barnaansingarsamskiparin umsitur, har dagstovnar, ið verða raktir av langtíðarsjúku, kunnu søkja um at fáa eitt ískoyti til teirra játtan – hetta fyri lutvíst ella heilt at dekka teirra meirútreiðslur av langtíðarsjúku. Í fyriliggjandi fíggjarætlan er einki sett av til langtíðarsjúku, og tað merkir, at vit í inniverandi ári mugu hava ta mannagongd, at verður ein dagstovnur raktur av langtíðarsjúku, sum elvir til meirnýtslu, verður tað lagt fyri TrN B&U sum eitt mál við umbøn um eykajáttan.

Flyting til landið (gjald fyri vantandi barnaansing):
Henda játtan er óbroytt, kr. 430.000.

Inntøkur, aðrar kommunur (innanhýsis flyting millum almennar stovnar):
Inntøkur frá øðrum kommunum, sum gera brúk av dagstovnunum hjá kommununi, verða inntøkuførdar á hesum rakstrarstaði. Tað er ilt at siga, hvussu stórar hesar inntøkurnar verða í inniverandi ári, men út frá gongdini seinastu tíðina verður mett, at væntaða inntøkan fyri í ár kann setast til kr. 750.000, sum er ein hækking á kr. 150.000 í mun til samtyktu fíggjarætlanina fyri 2017.

§ 3 Børn og ung – samanlagt
Við hesum broytingum verður útreiðslusíðan í høvuðskontubólki 3 økt við kr. 270.000, samstundis sum inntøkusíðan verður økt við kr. 150.000. Sostatt geva tær í hesum skrivi tilmæltu broytingar og flytingar millum kontur, netto eina eykajáttan á kr. 120.000, sum mælt verður nevndum og býráð til at játta av tøka peningi kommununnar.

Talan er sostatt um eitt eykajáttanarmál, sum harvið krevur tvær býráðssamtyktir fyri at fáa formligt gildi. Málið verður tí lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið í hesum fundarumfarinum (februar) og síðan enn einaferð fyri býráðsfundin í mars mánað til seinnu viðgerð og samtykt.

Framtíðar mannagongdir:
Ynskiligt er, at okkara talvur framyvir gerast partur av sjálvari tí samtyktu ársfíggjarætlan býráðsins, so vit kunnu umgangast tað – sum higartil hevur verið ein veikleiki – at tøl verða skrivað inn fleiri ferðir í ymisk ørk og yvirlit, áðrenn tey náa fram til sjálvt skjalið/skjølini, sum eru tann autoriseraða ársfíggjarætlanin, ið verður samtykt at nevndum og býráð.

Lógargrundarlag:
Í kommunustýrislógini, § 41, er ásett, at "kommunustýrið hevur játtanarmyndugleikan. Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk".

Fíggjarligar avleiðingar:
Sí omanfyri standandi talvu, tilhoyrandi viðmerkingar og viðfestu notur.

Tilmæli:

Mælt verður nevndum og býráð til at samtykkja omanfyri útgreinaðu broytingar og flytingar millum kontur, har útreiðslurnar í høvuðskontubólki 3 verður øktar við kr. 270.000 og inntøkurnar við kr. 150.000, sum netto gevur eina eykajáttan á kr. 120.000, ið mælt verður nevndum og býráð til at játta av tøka peningi kommununnar.

TrN B&U 14-02-2017
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, dagfest 09.02.17.

FíN 21-02-2017
Málið útsett til komandi nevndarumfar.

Býráðsins samtykt 23-03-2017
Atkvøtt varð um soljóðandi uppskot frá borgarstjóranum: *"Mælt verður til at taka undir við TrN B&U 14-02-2017 tó við tí broyting, at írestandi upphædd á kr. 120.000 verður fíggjað innan verandi fíggjarkarm á trivnaðarøkinum, eisini vísandi til mál 30/17 (j.nr.: 16/00789) um framflytingar og umraðfestingar."*

Uppskotið einmælt samtykt.

30/17 (5)
17/00196 Ferðsluljós við Dr. Margrethu Barnagarð og Norðoya Sparikassa

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Ferðslunevndin	14.02.2017	10/17	
2 Tekniska Nevnd	15.02.2017	9/17	
3 Fíggjarnevndin	21.02.2017	20/17	
4 Klaksvíkar Býráð	23.03.2017	30/17 (5)	

Frágreiðing um málið:
Borgarstjórin og formaðurin í Teknisku Nevnd hava lagt uppskot fram, um at fáa ferðslukurv upp við Dr. Margretu Barnagarð og við Norðoya Sparikassa.

Ljósið skal sambært uppskotinum virka soleiðis, at næmingar, børn og onnur kunnu trýsta á ein knapp, tá ið tey koma til gonguteigin, sum síðan ger, at ferðsluljósið fer frá grønum til gult og síðani til reytt eftir einari løtu, tá ferðslan steðgar, og gingið kann verður tvørtur um vegin.

Talan er sambært hesum um eina verkætlan, sum skal gera tað tryggari hjá fólki at fara tvørtur um gonguteigin á nevndu vegateinum, har sera nógv ferðsla er.

Talan er um nógv brúktar skipanir í øðrum londum, har nógv ferðsla er. Skipanir, sum minna um eru eisini í Føroyum, t.d. í Norðdepli og við Steinatún í Tórshavn. Kostnaðurin av tveimum ferðsluskipanum er mettur til kr. 450 tkr *(tølini hava vit frá líknandi verkætlanum í føroyum).*

Heitt er á ferðslugranskoðara, um at gera eina meting av málinum. Niðurstøðan er, at talan er um eina ferðsluloysn, sum minkar um talið av óhappum. Ferðslugranskoðarin mælir, at kommunan fremur eina ferðslutrygdarætlan fyri Skúlan á Skúlatrøð, har ferðsluljós við gonguteigarnar verður eitt av tiltøkunum til betran av trygdini. Í hesum sambandi skulu vit vísa á, at nøkur tiltøk eru gjørd, fyri at tálma ferðsluna. Sí annars viðfest notat.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking.

Fíggjarligar avleiðingar:
Skal málið fremjast er neyðugt við einari eykajáttan uppá 450 tkr. í 2017, sum verður at fíggja av tøkum peningi hjá kommununi.
Ein annar møguleiki er at fíggja arbeiðið av avsetingini til skúlabyggingina, og verður tí helst neyðugt at endurskoða fíggjarætlanina fyri verkætlanina "Skúlabygging á Skúlatrøð", sum verður liðug árskiftið 2018/2019.

Tilmæli:
Við hesum verður málið lagt fyri viðkomandi nevndir og býráð til umrøðu/støðutakan.

FeN 15-02-2017:
Nevndin tekur undir við, at ferðsluljós (ljóskurv) verður sett upp við Dr. Margrethu Barnagarð og við Norðoya Sparikassa. Heitt verður á Fíggjarnevndina, um at taka støðu til fíggingina.

TN 15-02-2017:
Nevndin tekur undir við FeN 15-02-2017.

FíN 21-02-2017
Málið útsett til komandi nevndarumfar.

Býráðsins samtykt 23-03-2017
Atkvøtt varð um soljóðandi uppskot frá borgarstjóranum: *"Mælt verður til at taka undir við FeN og TN at fremja arbeiðið, og at kostnaðurin verður fíggjaður innan verandi fíggjarkarm á tekniska økinum, eisini vísandi til mál 30/17 (j.nr.: 16/00789) um framflytingar og umraðfestingar."*

Uppskotið einmælt samtykt.